## Ísland kann vegleiða ES

Fiskivinnukommiserurin hjá ES, Jan Borg, skrivar í einari blaðgrein, at Evropasamveldið eigur at lurta eftir øllum góðum ráðum, nú arbeitt verður við at leggja ein nýggjan fiskivinnupolitikk til rættis. Kommiserurin skrivar, at fiskiflotin hjá ES-londunum er ov stórur, og at veiðitrýstið er ov stórt. Tí er neyðugt við nýggjum reglum, og í hesum sambandi noyðast londini at taka avgerðir, sum fara at níva, skrivar hann. Jan Borg, sum er av Malta, heldur, at ESeigur at taka ímóti øllum góðum uppskotum og ráðum, og hann heldur, at samveldið eigur at fáa gagn av royndum íslendinga á fiskivinnuøkinum.



## Vil ikki til Danmarkar

Sviin Mikael Ljungman, sum sambært donsku løgregluni hevur havt rættiliga nógv samband við tann svikskuldsetta Stein Bagger, hevur ongan hug at gera eftir ynskinum frá danska ákæruvaldinum, sum vil hava orð á hann. Danska løgreglan vil vera við, at Michael Ljungmann hevur verið við til at svika fyri 266 milliónir krónur og hevur tí kravt at fáa hann útflýggjaðan úr Svøríki. Tann 26. mai skal rætturin í Stockholm taka støðu til, um Ljungmann skal sendast um Oyrasund. Ætlanin er, at rættarmálið ímóti Stein Bagger skal byrja í Lyngby tann 10. juni.

# Ongar barnabillettir í politikki



*Hans Engell var í gjárkvøldið høvuðsgestur í Miðlahúsinum, tá Demokratia skipaði fyri kjakfundi. Hann segði millum annað, at ongar barnabillettir eru í føroyskum politikki. Treytirnar eru tær somu fyri kvinnur og menn, men at kvinnur ofta noyðast at arbeiða harðari enn mennirnir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ongar barnabilletir eru i politikkið, og tað ræður um at taka av teimum møguleikum, einum standast í boði. Soleiðis ljóða boðini frá Hans Engell, fyrrverandi politikara og blaðstjóra**

JAVNSTØÐA

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Líka sum í Føroyum, er ójavnstøða í donskum javnstøðupolitikki. Demokratia, sum virkar fyri javnstøðu í politikki, skipaði í gjárkvøldið fyri kjakfundi í Miðlahúsinum, har høvuðsgestur var Hans Engell. Hans Engell er fyrrverandi floksleiðari í Konservativa flokkinum í Danmark, og hevur harafturat virkað sum blaðstjóri á Ekstrablaðnum.

Í upplegginum til kjakfundin greiddi hann frá javnstøðugongdini í Danmark, og kom við ráðum til kvinnuligar politikkarar, sum ætla sær fram í politikki.

- Tað er sera einfalt. Ein skal hava eina greiða politiska hugsjón, ein boðskap og standa fyri onkrum. Tað eru ongar barnabillettir í politikki. Treytirnar eru tær somu fyri menn og kvinnur. Um ein heldur, at mennirnir ein dag seta seg niður og avgera at geva kvinnunum 20 av plássunum, tekur ein so dyggiliga feil, sigur Hans Engell.

### Kvinnurnar arbeiða harðari

Hóast boðskapur kann ljóða einfaldur, er tað als ikki líka lætt hjá kvinnum, ið ætla sær upp í politikk. Miðlarnir kunnu til dømis fara harðliga til verka, og leggja ofta harðari eftir kvinnunum enn monnunum.

- Miðlarnir hefta seg ikki við hvussu ein mannligur politikkari sær út ella hvussu hann klæðir seg. Men hetta eru ting, kvinnuligir politikkarar kunnu rokna við at verða útsettar fyri. Eg plagi at siga, at tá menn skulu arbeiða 100 prosent, skulu kvinnurnar arbeiða 110 prosent fyri at kunna fylgja við.

Men júst tað, at kvinnurnar arbeiða harðari enn mennirnir, gera tær áhugaverdar fyri ein floksformann, sum eigur at leggja seg eftir javnstøðu.

- Kvinnurnar arbeiða harðari, tær gera sær meir ómak, og møta sjáldan ófyrireikaðar upp til ein fund. Og tað gera tær lokkandi fyri ein formann.

Sjálvur hevur Hans Engell verið við til at ført fram kvinnuligar politikkarar, ið hava klárað seg væl í politiska spælinum. Eitt nú Lene Espersen, sum nú er formaður í Konservativa flokkinum,

- Tað, sum sermerkti teirra arbeiði, var ídni, styrki at svara fyri seg, tá orðaskiftið gongur harðliga fyri seg, og slagkraft í miðlunum.

### Ábyrgdin liggur hjá floksleiðarunum

Javnstøðan í donskum politikki er batnað. Men enn er nakað á mál. Næst eftir Føroyar, er Danmark tað landið í Skandinavia, ið hevur vánaligastu umboðanina í politikki.

- Politikkurin broytist ikki av at kvinnur koma upp í politikk. Men hann fær eina aðra dýpd. Eg vil eisini siga, at Fólkatingið er vorðið betur skipað, síðan kvinnurnar eru vorðnar so nógvar. Arbeiðslagið er vorðið meir effektivt.

Kvinnur halda seg aftur í politikki, og eru skjótar at takka nei til at taka við ábyrgd. Men her eru tað formennirnir í teimum ymsu flokkunum, ið hava ábyrgdina at fremja javnstøðu.

- Eg vil siga, at fremsta uppgávan hjá politisku leiðarunum er at fáa kvinnur at stilla upp. Tað vísir seg ofta, at tá tær eru komnar inn, dáma tær kortini væl politiska spælið. Og so kemur ábyrgdin av sær sjálvum, sigur Hans Engell.









